Vinnumálaráðið Tórshavn 24.02.21
Helgi Abrahamsen, landsstýrismaður
Tórshavn

Vit hava biðið um henda fund við landsstýrismannin fyri at heita á landsstýrið um fíggjarligan stuðul, vegna ta fíggjarligu trongstøðu, sum Ørkin er komin í, orsakað av Covid 19.

Vit hava søkt um stuðul úr hjálparpakkunum bæði í Føroyum og Íslandi, men tað vísir seg, at vit ikki uppfylla treytirnar fyri at fáa stuðul. Vit hava tó fingið eitt statsgaranterað lán í Íslandi uppá 400.000 kr., sum vit byrjað at gjalda niður uppá næsta ár.

Sum gongdin er í løtuni, hava vit bert likvititet til hendan mánaðan aftrat. Vit hava umsókn liggjandi hjá Bank Nordik um kassakredit, so vit kunnu hóra undan til rákið vendir væntandi í sept. Vit hava eisini havt fund við Kaj Leo H. Johannesen um at brúka Ørkina meir sum sjúklingahotell, og á tann hátt hjálpa til við rakstrinum.

Ørkin er føroyskur sjálvsognarstovnur, hvørs endamál er at vera eitt andaligt og sosialt heim fyri føroyingar sum búgva í Íslandi, lesandi, sjómenn, og fólk, sum koma til Reykjavíkar í sjúkraørindum . Ørkin er somuleiðis karmur um fundarvirksemi hjá Føringafelagnum og skúla í føoyskum fyri børn í Reykjavík. Áðrenn føroysk sendistova varð sett á stovn, røkti Ørkin hesa uppgávu í stóran mun.

Eftir at gamla sjómansstovan var niðurløgd vegna nýggja býarætlan á økinum, har sjómansstovan stóð, varð farið undir at byggja Ørkina á grundøkið, sum var ávíst av býráðnum. Hetta økið lá tá í útjaðaranum í býnum, men er í dag sera væl plaserað bara 15 min. til gongu frá miðbýnum, Laugardalinum, Perluni og Kringluni.

Byggitíðin var 15 ár, og var fyri tað mesta sjálvboðið arbeiði av føroyingum bæði í Íslandi og úr Føroyum. Fíggingin var fingin til vega við gávum, lutaseðlum, basarum o.l., sum var samlað inn bæði í Føroyum og Íslandi. Landsstýrið stuðlaði við 500.000 kr., so bygningurin kundi stoypast upp, so hann kundi innilokast.

Raksturin hevur hingið saman higartil. Bygningurin er hildin viðlíka, er dagførdur og er skuldarfríur. Men lítið er at standa ímóti við, og við støðuni, sum er íkomin, steðgar virksemið upp. Hendir tað, er stórur vandi fyri, at Ørkin gleppur okkum av hondum, og tað halda vit vera stórt spell.

Við vón um góða viðgerð.

Bestu heilsanir vegna nevndina

Jonhard Joensen, formaður, Skipanes